**SEMJA**

**MILLUM**

**REIÐARAFELAGIÐ FYRI HANDILSSKIP**

**OG**

**FØROYA SKIPARA- OG NAVIGATØRFELAG OG MASKINMEISTARAFELAGIÐ**

Omanfyrinevndu partar eru samdir um at leingja galdandi sáttmálar til 1. mars 2023 við hesum broytingum:

1. Løn og eftirløn hækkar í sáttmálaskeiðnum soleiðis:

   Hin 1. juni 2021

   | | |
   |---|---|
   | Lønin hækkar | 1,55 % |
   | Eftirlønin hækkar | 0,5 % |

   Hin 1. mars 2022

   | | |
   |---|---|
   | Lønin hækkar | 1,25% |

2. Í grein 10, stk. 1 í sáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Skipara- og Navigatørfelagið og grein 3, stk. 2 í sáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Maskinmeistarafelagið verður "*1,2*" broytt til "*1,25*" og "*15%*" verður broytt til "*20%*".

3. Grein 5, stk. 1, 3. pkt. í sáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Skipara- og Navigatørfelagið og grein 2, stk. 1, 4. pkt. í sáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Maskinmeistarafelagið um uppsagnartíð sum sigur, at "*Samsýningin í §41 í lóg um sjómenn kann mótroknast hesi uppsagnartíð.*" verður broytt til "*Tíðarskeiðið, sum samsýningin í §41 í løgtingslóg um starvsviðurskifti o.a. hjá sjófólki svarar til, kann mótroknast hesi uppsagnartíð.*"

4. Viðbøturnar fyri einameistarar í §3, stk. 10 í sáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Maskinmeistarafelagið hækka við 232 kr.

5. Eitt nýtt protokollat verður sett inn í sáttmálan, sum sigur:

   "*Partarnir eru samdir um, at um reiðarívirksemi innan havaling ella vindorku tekur seg upp í Føroyskum øki, eiga sáttmálapartarnir at fara undir samráðingar um sáttmála fyri hetta økið við tí fyri eyga, at sáttmáli er gjørdur, áðrenn virksemi byrjar.*"

6. Í lønartalvuni fyri yvirmenn og dekkarar við veitingarskipum verður 2. stýrimaður settur inn saman við elektrikarum.

7. Í grein 27, stk. 1 í høvuðssáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Skipara- og Navigatørfelagið og grein 21 í høvuðssáttmálanum millum Reiðarafelagið fyri Handilsskip og Maskinmeistarafelagið verður "2019" brottt til "2021", og "2021" broytt til "2023". Gildiskomurnar í sersáttmálunum verða dagførdar samsvarandi.

**Tórshavn, 24. februar 2021**

Fyri Reiðarafelagið fyri Handilsskip — Jens Meinhard Rasmussen, formaður

Fyri Føroya Skipara- og Navigatørfelag — Annfinnur Garðalíð, formaður

Fyri Maskinmeistarafelagið — Ólavur Gunnarsson, formaður